

www.oljan.fo

**Jan Müller** 03 - 11 - 2012

# Statoil leggur 700 størv niður

Statoil fer at fremja nakrar broytingar í bygnaðinum, og týsdagin fer felagið at kunngera, at 700 størv verða løgd niður innan umsiting og tænastu. Sambært Aftenbladet fara 500 fólk í føstum starvi at missa tað arbeiðið, sum tey hava, og tað sama gera 200 fólk, sum felagið hevur leigað frá veitarum. Jannik Lindbæk, kunningarstjóri, sigur við blaðið, at hetta verður gjørt, so hesin parturin av virkseminum og útreiðslunum kemur á sama støðið sum hjá øðrum feløgum av sama slagi. Hann leggur afturat, at tey flestu arbeiðsplássini, sum verða niðurløgd, eru í Stavanger. Góðtaka ikki uppsagnir Bygnaðarbroytingarnar koma í gildi 1. apríl næsta ár, og Statoil sigur, at so mong sum gjørligt fáa møguleikan at halda fram í øðrum arbeiði hjá felagnum. Í hesum viðfangi hevur felagið funnið meiri enn 300 størv, sum fólk kunnu umhugsa at skifta til. Fimm fakfeløg hava biðið Statoil veita trygd fyri, at eingin missir arbeiðið orsakað av bygnaðarbroytingunum. -Tað er heilt greitt, at vit góðtaka ikki, at bygnaðarbroytingarnar hava uppsagnir við sær. Statoil er í stórum vøkstri, og soleiðis sum vit meta gongdina, fær felagið brúk fyri fleiri hundrað starvsfólkum afturat í næstu framtíð. Harafturat eru umleið 3.000, sum eru leigað frá øðrum, og tey mugu sjálvandi víkja fyri teimum føstu starvsfólkunum, sum noyðast at skifta, sigur Bjørn Asle Teige, sum er fakfelagsumboð hjá einum parti av starvsfólkunum hjá Statoil, við tíðindastovuna NTB.